www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




# Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um **1.februar**, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seinsta freist at søkja starvið er **22. januar 2007**, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*



# MASKINASSISTENTUR TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir maskin-/skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til maskin-/skipsassistent:**
- Maskinsmiðjur
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Vera ágrýtin og røkin
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur:**
- Alt vanligt maskin- og skipsarbeiði

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. januar 2007.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:

+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

# Arbeiðsformaður

Í sambandi við eitt størri vegarbeiði í Tórshavn søkja vit eftir royndum arbeiðsformanni.
Arbeiðsformaðurin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at sum mest fæst burtur úr arbeiðsmegini hjá fólki og maskinum.

Tann, ið vit leita eftir, er

- sjálvstøðugur
- royndur innan veg- og lendisarbeiði (jørð- og kloakk)
- nærlagdur við góðum yvirliti
- dugnaligur at arbeiða í toymi
- røkin

Arbeiðsformaðurin kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við byggileiðsluna.

Vit bjóða eitt gott og spennandi arbeiðsumhvørvi í einum starvi, sum er krevjandi og mennandi fyri tann rætta persónin. Lønina tosa vit um.

Send eina umsókn, merkt arbeiðsformaður, til J & K Petersen á adressuni niðanfyri í seinasta lagi mánadagin 8. januar 2007. Eru spurningar viðvíkjandi starvinum skulu teir stílast til Steinolv Petersen, tel 585001..
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

J & K Petersen er eitt av eldstu entreprenørvirkjunum í landinum. Tey umleið 70 starvsfólkini, sum eru úr øllum fakbólkum, loysa allar anleggs- og byggiuppgávur.

SISERO 351800

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo